## Lýst verður eftir landsliðsvenjara í hondbólti

**Herfyri setti Hondbóltsamband Føroya lýsing í bløðini, har søkt verður eftir nýggjum venjara til føroyska manslandsliðið**

LANDSLIÐS-HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyri nøkrum vikum síðani visti Sosialurin at siga, at samstarvið millum Hondbóltssamband Føroya og táverandi landsliðsvenjaran hjá monnum, danan Lars Nedergaard, var komið at enda. Formaðurin í HSF, Eivind Jacobsen, segði tá, at fíggjarligu umstøðurnar vóru ikki til at hava danan sum venjara, og tí vóru partarnir komnir ásamt um at enda samstarvið.

### Eingi krøv sett

Í starvslýsingini hjá HSF stendur stutt og greitt, at hondbóltssambandið søkir eftir landsliðsvenjara til A-landsliðið hjá monnum. Einki verður nevnt um, at umsøkjarar skulu hava ávís venjaraskeið ella royndir, so tað stendur einum og hvørjum frítt at søkja.

Eivind Jacobsen segði við Sosialin, at tað bert verður lýst í føroysku miðlunum, so alt bendir á, at tað verður ein føroyingur, ið kemur at standa á odda fyri føroyska manslandsliðnum næstu árini. Ein av landsliðsleikarunum, Heini Hanusarson, segði í tí sambandi, at hann heldur ikki, at tað ber til at finna ein venjara í Føroyum, sum kann geva føroyska landsliðnum eins nógv og Lars Nedergaard. Umsóknarfreistin til starvið sum landsliðsvenjari er úti 4. juni.



*Nú verður lýst eftir avloysara fyri Lars Nedergaard sum landsliðsvenjara*
*savnsmynd*

# Heidi á veg til Bretlands

**Eitt av okkara fremstu ítróttarfólkum, svimjarin Heidi Andreasen, fer í dag til Onglands, har hon um vikuskifti skal royna seg í stórari kapping**

SVIMJING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fáur føroyingur hevur vunnið so nógv heiðursmerkir í altjóða ítróttarkappingum, sum svimjarin av Eiði, Heidi Andreasen. Ferð aftaná ferð er hon komin heim aftur á klettarnar við hópin av medaljum um hálsin, eftir at hon hevur luttikið í kappingum uttanlands.

### Fyrst og fremst venjing

Heidi fer í dag til Onglands saman við venjara sínum, Remi Lamhauge, og leiðin gongur til Sheffield, har kappingin verður um vikuskiftið. Byrjað verður fríggjamorgunin, og kappingin endar sunnudagin.

Kappingin, sum Heidi skal taka lut í, eitur British Trials, og er hetta ein kvalifikatiónskapping til Paralympics, ið verða seinni í ár. British Trials er ein ógvuliga stór og umfatandi kapping, har kappast verður í øllum ítróttargreinunum, sum verða við á Paralympics í Athen seinni í ár. Remi Lamhauge sigur, at hendan kappingin er seinasta freist hjá bretsku íðkarunum at tryggja sær luttøku í Paralympics, men hetta er ikki nakað, ið Heidi noyðist at hugsa um, tí hon hevur langt síðani vunnið sær rætt til at taka lut í stóru kappingini.

Endamálið hjá Heidi við at taka lut í hesi stóru kappingini er fyrst og fremst at venja seg við at svimja í 50 metra hyljum, sigur Remi Lamhauge. Harafturat er tað eisini ein kærkomin møguleiki hjá ungu eiðisgentuni at kappast móti øðrum íðkarum í hennara bólki, sigur venjarin Remi Lamhauge.

### Skal svimja í seks kappingum

Meðan Heidi er í Sheffield, skal hon taka lut í seks ymiskum kappingargreinum í British Trials. Hon skal svimja 50, 100 og 400 metrar frísvimjing, 200 metrar blandað, 100 metrar firvaldarsvimjing og 100 metrar ryggsvimjing.

Tá ið Heidi Andreasen herfyri tók lut í stórari altjóðari kapping í Esbjerg í Danmar, tók hon eisini lut í júst hesum seks kappingargreinum, og tá var úrtøkan ikki at kimsa at. Tá kom Heidi aftur av flatlondum við fimm gullheiðursmerkjum og einum silvurheiðursmerki í skjáttuni, og spennandi verður at frætta, um umrtøkan fer at verða eins góð, tá ið hon kemur heim aftur úr Sheffield mánadagin saman við venjara sínum.



*Heidi Andreasen og venjari hennara Remi Lamhauge fara í dag til Sheffield í Ongandi, har Heidi um vikuskifti skal taka lut í stórari svimjikapping*
*mynd: ÍSB*

# Familjan Rapa heldur fram í Vestmanna

Síðani landskappingin í hondbólts endaði fyri einum mánaða síðani, hava nógvar gitingar verið frammi um, hvar teir ymisku leikararnir fóru at verða komandi kappingarár. Millum hava rumensku hjúnini í Vestmanna, Ioana og Daniel Rapa, verið nógv umrødd.

Tey bæði, ið nú hava verið í Føroyum í seks ár, hava verið sett í samband við bæði Neistan og Kyndil, men nú er so greitt, at Ioana og Daniel halda fram í Vestmanna. Fráfarandi formaðurin í VÍF, Jógvan Sigurd Poulsen, sigur, at avtala er gjørd við tey bæði, um at tey halda fram í VÍF, har tey hava verið øll árini, síðani tey komu til Føroya. Tó er greitt, at Daniel Rapa ikki fer at halda fram sum venjari hjá kvinnuliðnum hjá VÍF, men enn vil Jógvan Sigurd ikki avdúka, hvør ið skal venja kvinnuliðið.

**tn**



*Nú er greitt, at tey bæði Daniel og Ioana Rapa halda fram í VÍF komandi kappingarár*
*mynd: Álvur Haraldsen*



# Skjeyt seg í fingurin



*Ein timburmaður var um dagarnar so óheppin at skjóta ein seym gjøgnum ein fingur. Hann fór gjøgnum bein og tað heila, men gjørdi ikki mannin óarbeiðsføran kortini*
*Mynd: Arbeiðseftirlitið*

**Ein timburmaður var herfyri so óheppin at skjóta ein seym gjøgnum ein fingur. Ein misskiljing millum mannin og alarmasentralin gjørdi, at hann sjálvur valdi at koyra á skaðastovuna, hóast hann fekk bodnan sjúkraflutning**

ARBEIÐSSKAÐI
*Edvard Joensen*

Ein timburmaður koyrdi hendan dagin úr Hvalvík til Havnar við einum seymi standandi í øðrum fremstafingrinum. Hann fór á skaðastovuna, har hann sat í eina økt og bíðaði eftir viðgerð.

Meðan hann arbeiddi við húsasmíði i Hvalvík, var ein maður so óheppin at skjóta ein seym gjøgnum fingurin. Bein og tað heila. Og har sat hann so rimmarfastur, og fekst ikki úraftur.

Maðurin var fremmandur í Hvalvík og visti ikki, hvar næsti lækni var. Hann ringdi tí til alarmasentralin og bað siga sær, hvar skjótast var at koma undir læknahond og fáa seymin úraftur.

Men her er so einhvør misskiljing íkomin, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur, sum varðar av alarmsentralinum. Tó ikki verri enn so, at eingin skaði stóðst av henni kortini.

Alarmsentralurin bjóðaði manninum at senda sjúkrabil eftir honum og flyta hann á skaðastovuna á Landssjúrkahúsinum.

Men maðurin helt, at tað fór at taka ov langa tíð fyrst at fáa bil at koyra úr Havn til Hvalvíkar og síðan suðuraftur, so hann svaraði, at hann koyrdi bara sjálvur suður.

Maðurin sigur við Sosialin, at hann skilti á vakthavandi á alarmasentralinum, at hesin bað hann leggja á og so skuldi hann ringja aftur, tá hann visti, hvar næsti lækni var í mun til Hvalvíkina. Tí vildi hann ikki bíða eftir og fór tí sjálvur í bilin og koyrdi til Havnar.

Har er so onkur misskiljing íkomin, sigur Jón Klein Olsen. Tað, ið sagt varð um at ringja aftur, var at portørarnir í sjúkrabilinum skuldu ringja til hansara, tá teir vóru ávegis. Vit vistu ikki nágreiniliga, hvussu illa skaddur maðurin var, sigur hann.

Løgreglan tryggjaði sær, at maðurin kom væl fram til skaðastovuna, og Arbeiðseftirlitið var eisini og kannaði málið. Bæði mannin sjálvan og seinni arbeiðsplássið.

Tíbetur var skaðin ikki so stórur, at maðurin fær nakað mein av hesum, og Arbeiðseftirlitið metir skaðan sum hendiligan og ger ikki meira við málið, sigur Jón Klein Olsen.

Men óhepni timburmaðurin sat í heilar tríggjar tímar á skaðastovuni og bíðaði eftir ækna, áðrenn hann fekk seymin tiknan úr. Ein sjúkrasystir gav hon okkurt doyvandi móti pínu, meðan hann bíðaði.

Óhappið hendi seinasta fríggjadag, og maðurin er longu aftur til arbeiðis.

**Ein genkanning kann staðfesta, hvørjir sjúklingar kunnu lekjast við einum heilivági fyri lungakrabba. Hesin nýfunni kanningarháttur er eitt frambrot fyri viðgerð av einum slagi av krabba, sum hevur høgan deyðatíttleika**

GRANSKING OG VIÐGERÐ
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Í Svøríki er triði hvør tilburður av krabbameini, lungakrabbi. 85 prosent av sjúklingum við lungakrabba fáa staðfest tað vanligasta slagið, sum er ikki smákyknað.

Higartil hevur sjúkrahúsverkið ikki havt nógv at bjóða sjúklingum, sum hava fingið staðfest hetta slagið av lungakrabba, ið hevur ein høgan deyðatíttleika.

Men nú hava amerikanskir granskarar funnið ein máta, sum ger tað møguligt skjótt at finna tey, sum kunnu lekjast við eini nýggjari effektivari viðgerð.

Úrslitini frá Dana Farbers cancerinstitut i Boston og einum bólki av granskarum við Massachusetts General Hospital, verður av serfrøðingum mett at vera eitt frambrot innan nútímans krabbameinsgransking.

Heilivágurin, sum talan er um, eitur Iressa. Hesin heilvágur hevur fyrr víst seg at lekt summar sjúklingar, meðan hann hevur verið fullkomiliga uttan ávirkan á aðrar.

Nú hava granskarar so funnið útav, at ein genkanning kann staðfesta, hvørjir sjúklingar kunnu lekjast við Iressa.

Tað sera áhugaverda við úrslitunum hjá granskarunum er, at tað vísir seg at vera stórur skilnaður í sjúkunum millum ymisku fólkasløgini.

Gengranskingar fara tí í framtíðini at hava stóran týdning í granskingini av øðrum krabbameinssjúkum.

*Kelda: Dagens Nyheder*

# Peningur í glaðari starvsfólkum

**Nógvar milljónir krónur kunnu sparast, um arbeiðsumhvørvið á almennum arbeiðsplássum varð bøtt. Tað vísir ein nýggj kanning, sum Forbundet af Offentlig Ansatte í Danmark hevur gjørt**

ARBEIÐSUMHVØRVI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

FOA hevur kannað 1100 av sínum limum, fyri at finna orsøkina til fráveru vegna sjúku. Niðurstøðan er, at bæði tað fyskiska og tað sykiska arbeiðsumhvørvið hevur stóra ávirkan á fráverutíttleikan.

Víst verður á, at bert við at lække sjúkudagatalið úr 15 niður í 12, eru milljónir hjá landinum at spara.

FAO finst at tí almenna, fyri ikki at gera langtíðarhugsanir.

– Tað er ein vanlukka, at tað verður nýttur so nógvur peningur uppá skúkufráveru, sum ístaðin kundu verið nýttur til at bøta um arbeiðsumhvørvið, sigur Inger Bolwinkel, skrivari í Forbundet af Offentlig Ansatte í Danmark.

*Kelda: Jyllands Posten*

.

## Ímintur norðmaður

**Ein hevnisøkin norðmaður tók til grovan harðskap móti einum manni, sum oyðilegði jakkan hjá beiggja hansara í endanum av 70 árunum**

HEVNDARHUGUR
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Íminti norðmaðurin hevur fingið 60 daga treytaleysa fongsluslrevsing fyri grovan harðskap móti einum øðrum norðmanni.

Maðurin kom saman við beiggja sínum koyrandi, tá hann sá ein mann til gongu, sum fyri 20-25 árum síðani hevði oyðilagt jakkan hjá beiggja hansara.

Hann gjørdi av, at nú skuldi syndarin fáa av at vita. Síðani leyp hann úr bilinum og legði á mannin, sum saman við unnustu sínari var farin sær ein gongutúr.

Ólukkudýrið, sum ikki grunaði nakran vanda, varð sligin niður og síðani sparkaður sundur og saman.

So – hóast árini ganga…

*Kelda: Aftenposten*